Gregersen:

-Satt at siga havi eg ongantíð fingið viðmerkingar um tað í Gøtu, men eg havi hinvegin fingið skotið okkurt í skógvarnar, tá eg havi verið aðrastaðni í landinum.

Flest allir Gregersen menninir hava verið ella framvegis eru virknir vinnulívsmenn, men kortini valdi Árni eina lívleið sum tíðindamaður.

-Eg hevði góða sjónatúr, og eg var nógv til sjós sum yngri. Eg fekk kortini tíðliga at vita, at eg fekk ikki sjónroynd sum skipari, so tann møguleikin glapp. Hinvegin hevði eg eitt ynski um at gerast tíðindamaður frá heilt ungum árum sigur Árni Gregersen.

Hóast Gregersen menninir úr Gøtu vanliga bera orð fyri at vera fólkafloksveljarar, sigur Árni seg ikki kunnað sameina seg við nakran politiskan flokk.

-Øll, sum kenna meg vita, at eg eri frælsishugaður. Eg haldi, at vit skulu taka ábyrgd á so nógvum sum gjørligt. Tú kanst siga, at eg liggi á loysingarvonginum, men eg havi altíð verið ein ótrúgvur veljari, tí eingin flokkur kann binda meg, sigur hann.

## Bragdligur

Árni Gregersen er fúsur at fortelja, tá hann verður biðin at greiða frá sínum meira persónligu síðum og eginleikum.

-Eg haldi eg eri gávaður við einum løttum lyndi, og eg haldi eisini eg eri opin. Tað liggur eitt sindur til slagið at vera ótolin, og eg eri eisini kanska eitt sindur ov bragdligur. Hóast tú gerst meira róligur við árunum, kann eg framvegis rópa nógv og kasta við tingum, um onkur brølari verður gjørdur, fortelur 54 ára gamli gøtumaðurin.

Hann leggur afturat, at hann altíð hevur verið ein "spillopmakari", sum hann málber seg.

-Tað er ikki altíð so langt frá tanka til handling hjá mær. Eg livi framvegis tjúkt upp á at vera ein spillopmakari. Eg haldi tað eru fáar støður, sum tú ikki kanst loysa upp fyri eitt sindur av skemti. Sjálvandi er tað kortini eitt mark fyri, nær tú ert fjolluttur og nær tað er rætt at skemtast, vísir Árni Gregersen á.

Tíðindaleiðarin á Bornholm hevur eisini eina grundreglu, sum hann hevur fylgt stóran part av lívinum.

-Eg plagi at siga við børnini hjá mær, at tú skalt altíð hava eina meining um tingini, men tú nýtist ikki hvørja ferð, tú møtir einum fólki at siga tína hugsan. Tú skalt meina tað, tú sigur, men tær nýtist ikki altíð at siga tað, tú meinar. Hesin hugburður hevur eisini við sær, at eg kanska eri nakað konfliktdovin. Ikki tí, eg taki kortini gjarna tær konfliktir, sum skulu takast, men eg eri kanska eitt sindur rundur í tí-bæði so og so, fortelur hann flennandi.

## Aftur á gólvið

Tað eru eftirhondini 11 ár, síðan Árni Gregersen flutti til Bornholm við familjuni. Gøtumaðurin dugir ikki at siga, nær føroyingar kunnu vænta at síggja fyrrverandi sjónvarpsstjóran aftur í føroyska fjølmiðlaheiminum.

-Tað er ikki ómøguligt, at eg vendi aftur í føroyska fjølmiðlaheimin. Onkuntíð hugsi eg, at tað kundi verið stuttligt at arbeitt aftur sum vanligur tíðindamaður. Tað mesta, eg fáist við í dag er fyrisiting og leiðsla, og tá saknar tú ofta hetta við at tosa við fólk og formidla tíðindi. Tað er ótrúliga stuttligt at sleppa at fortelja eina góða søgu, og hetta er eisini tað grundleggjandi í journalistfakinum, sigur Árni Gregersen at enda.

i Sosialurin


# Lesið Sosialin - so eru tit við

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

á ólavsøku

Á ólavsøku hevur Tórshavnar kommuna wc-vognar standandi ynska staðni runt í býnum.



Vognarnir eru á hesum støðum:
Sjónleikarahúsið, Kommunuskúlagarðinum,
P-øki við J. Pæturssonar gøtu

Harumframt verða kommunalu wc-ini opin inni
í Kiosk Steinatún og við Mylnugøtu

Góða ólavsøku!

P/F ALMA MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Neyðventilatión / flytan av luft - Vortex**
Høgt trykk (560 Pa) og 3600 m3 um tíman.
Slanga kann setast til (305 mm).
Kann millum annað brúkast til ventilatión -
- aftaná eldsløkking.
- at turka bygningar.
- tá arbeitt verður í tangum.
- tá arbeitt verður við vandamiklum evnum.
Slanga til Vortex: 7,6 mtr. Kr. 4.750,- við mvg.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo

Kr. 7.350,- við mvg.



Bert galdandi 28. og 29. juli

Ólavs Steak

Borðreidd við dagsins grønmeti, ristaðari fersken, kryddeplum og kantarelsauce

Frá kl. 11.30 - 17.00
bara 98,-

Frá kl. 17.00 - 198,-

Vit hava eisini vanl. a la carte

RIO BRAVO RESTAURANT

RIO BRAVO
TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67
www.riobravo.fo

· Beef & Steak House ·